


# Góðir møguleikar fyri øktum samstarvi

**Meðan íslendski mentanarráðharrin, Katrin Jakobsdóttir, er í Føroyum á norðurlendskum samstarvsráðharrafundi, ynskti hon eisini at hitta føroyska starvsbróður sín, Helenu Dam á Neystabø**

Leo Poulsen

Hon varð vald inn á Altingið í 2007, og situr nú sum mentamálaráðharri í íslendsku stjórnini við ábyrgd av undirvísing, gransking og mentan.

34 ára gamla Katrín Jakobsdóttir er í løtuni næstforkvinna í flokkinum Vinstra-Grøna og gjørdist mentamálaráðharri eftir valið í 2009.

Í hesi vikuni hevur hon verið í Føroyum á fundinum hjá norðurlendsku samstarvsráðharrunum, og í tí sambandi vildi hon fegin hitta Helenu Dam á Neystabø.

- Føroyski mentamálaráðharrin var í Íslandi og vitjaði herfyri, og nú vildi eg nýta høvið at hitta hana aftur, eftirsum eg kortini eri í Føroyum, og halda fram við teimum tingingum, vit høvdu í Íslandi, sigur Katrín Jakobsdóttir.

Hon heldur, at serliga innan havgransking átti at borið til at samstarva enn meira.

- Okkara lond eru ógvuliga lík og eru oyggjasamfeløg. Vit liva bæði fyri ein stóran part av havinum, so sjálvandi eiga vit at kunna samstarva meira innan tað øki, sigur Katrín Jakobsdóttir.

Hon viðgongur, at tað er munandi truplari at umsita mentanarmál, eftir at kreppan rakti.

- Innan øll trý økini, eg umsiti, eru stórir niðurskurðir gjørdir í játtanunum, so tað er ein trupul uppgáva at vera mentanarráðharri í Íslandi nú, sigur Katrín Jakobsdóttir.

leo@sosialurin.fo



*Helena Dam á Neystabø og Katrín Jakobsdóttir, mentamálaráðharrar í Føroyum og Íslandi, hittust til fundar í dag*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



## *Jens Marni* í gongd við nýggja fløgu

The Right Way hjá Jens Marna Hansen er millum mest seldu fløgurnar í Føroyum. Hetta hevur givið Jens Marna Hansen gott mót at halda áfram.

Leygarkvøldið 11. september kl. 23:00 verður Jens Marni at hoyra í Kaspar á Áarvegnum í Havn og í summar kemur aftur ein nýggj solofløga.

Tað gjørdist veruliga ein succes, tá Jens Marni Hansen gjørdi av at geva út solofløguna The Right Way. Hetta var fløgan, sum gav honum møguleikan at sleppa at hita upp fyri Brian Adams á Tórsvølli og atgongd til danska Melodi Grand Prix.

Jens Marni hevði roknað við at selja umleið 3 túsund eintøk av fløguni og sendi tí 3.200 eintøk út á marknaðin. Men fløgan varð skjótt rivin burtur og hann mátti gera túsund eintøk afturat til væl nøgdu keypararnar. Higartil eru umleið 3.500 eintøk seld av fløguni í Føroyum, og er hon tí eftir egnari meting mest selda Pop Rock fløgan her heima.

Hetta hevur givið Jens Marna Hansen gott mót at halda áfram. Tískil er hann farin í gongd við at fyrireika eina nýggja solofløgu, sum skal koma á marknaðin í summar. Ætlanin er at fara í upptøkuhølini í januar, vita tey at siga á Kaspar.

Leygarkvøldið kl. 23:00 spælir Jens Marni Hansen í Kaspar á Áarvegnum í Havn og í oktober gongur leiðin til Keypmannahavnar, har hann millum annað skal spæla á kenda tónleikastaðnum "Dropp Inn".

## Í MORGIN




Gul til stívt andøvsgul av av landsynningi og suðri og regn av og á. Hitin millum 11 og 13 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn av og á. Seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

## LEYGARDAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðsti nátt:**
Eitt lágtrýst, 987 hPa. í útnyrðing úr Írlandi fer vestureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar komandi samdøgur.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið við Føroyar fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

8. sept Tendring/mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. sept | 06:57 | 19:22 | 05:57 | 18:22 | 06:12 | 18:37 | 08:57 | 21:22 | 09:57 | 22:22 | 05:12 | 17:37 | 04:12 | 16:37 | 07:12 | 19:37 | 08:12 | 20:37 | 06:42 | 19:07 | 07:57 | 20:22 |
| 9. sept | 07:47 | 20:13 | 06:47 | 19:13 | 07:02 | 19:28 | 09:47 | 22:13 | 10:47 | 23:13 | 06:02 | 18:28 | 05:02 | 17:28 | 08:02 | 20:28 | 09:02 | 21:28 | 07:32 | 19:58 | 08:47 | 21:13 |
| 10. sept | 08:39 | 21:05 | 07:39 | 20:05 | 07:54 | 20:20 | 10:39 | 23:05 | 11:39 | - | 06:54 | 19:20 | 05:54 | 18:20 | 08:54 | 21:20 | 09:54 | 22:20 | 08:24 | 20:50 | 09:39 | 22:05 |
| 11. sept | 09:31 | 21:57 | 08:31 | 20:57 | 08:46 | 21:12 | 11:31 | 23:57 | 00:05 | 12:31 | 07:46 | 20:12 | 06:46 | 19:12 | 09:46 | 22:12 | 10:46 | 23:12 | 09:16 | 21:42 | 10:31 | 22:57 |
| 12. sept | 10:24 | 22:51 | 09:24 | 21:51 | 09:39 | 22:06 | - | 12:24 | 00:57 | 13:24 | 08:39 | 21:06 | 07:39 | 20:06 | 10:39 | 23:06 | 11:39 | - | 10:09 | 22:36 | 11:24 | 23:51 |